## 10 TING UM VICTORIU PRINSESSU

**LAGT TIL RÆTTIS:** Inna Törnroos



**MYND:** POLFOTO

# Giftur seg við venjaranum

**1** Hon gjørdist ikki krúnprinsessa fyrr enn hon var trý ár. Svøríki innførdi kvinnuliga trónfylgju í 1980.

**2** **Hon verður gift við Daniel Westling 19 juni í ár. Sama dag sum foreldur hennara vóru gift fyri 34 árum síðani.**

**3** Hennara fulla navn er Victoria Ingrid Alice Désirée

**4** 1997 hevði Victoria etingarólag (anorexia). Hon fór til USA at lesa, og kom fyri seg har.

**5** Victoria møtti komandi manninum, Daniel Westling, tá hon vitjaði venjingarmiðstøð hansara í 2002. Hann var hennara persónligi venjari.

**6** Victoria er tríměningur við krúnprins Fredrik og prins Joakim.

**7** Victoria heldur sín føðingardag á sama plássi hvørt ár – á Ølandi í summarslottinum Solliden.

**8** **Victoria er, sum pápi sín, eisini orðblind, og hevur í samrøðum greitt frá teimum trupulleikum, hetta hevur haft við sær í skúlanum.**

**9** Ja, Ja, Ja, Ja – svaraði Victoria, tá Daniel bað um hond hennara.

**10** Victoria er søgulig eftirsum hon er fyrsta drotning, ið giftur seg við einum »vanligum« manni í Svøríki.

## SITAT



*Áðrenn eg varð giftur hevði eg seks teoriir um barnauppalan. Nú eigi eg seks børn og ongar teoriir.*

***Lord Rochester (1647-1680)***

**LAGT TIL RÆTTIS:** Inna Törnroos

## MIÐLARNIR OG EG



í nýggja táttinum siga kendir og ókendir persónar frá síni miðlanýtslu.

### FULLTRÚIN Í UTTANRÍKISRÁÐNUM, PÁLL HOLM JOHANNESEN, LESUR UM POL POT OG HYGGUR AT »HOUSE«

**MÍTT BLAÐ**
Weekendavisen er tað einasta blaðið, eg keypi í pappírsformi. Hana keypi eg av og á. Annars lesi eg Sosialin, Dimmalætting og Norðlýsið á netinum.

**MÍN HEIMASÍÐA**
Eg eri rættiliga forvitin av lyndi. Tí lesi eg eina rúgvu av heimasíðum gjøgnum dagin. Tað fevnir breitt frá útlendskum – og føroyskum tíðindasíðum til ymiskar fótbóltssíður. Millum føroysku síðurnar eru Portalurin, Kringvarpið, Norðlýsið, Dimma, Mess og kjak.org. Av útlendskum heimasíðum kann eg nevna Politiken, DR, Berlingske, JP, Altinget, EU-observer, Ræson og BBC.

**MÍN TÓNLEIKUR**
Eg havi rímuliga rótuttan tónleikasmag. Úr rúgvuni kunnu nevnast Mew, Kashmir, Muse, Depeche Mode, Pet Shop Boys, Leonard Cohen, Kári P og Sigur Rós. Seinasta fløgan eg keypti var Skuggagestir. Eitt nostalgikeyp.

**MÍTT SOSIALA NETVERK**
Eg blívi ikki ordiliga klókur uppá mínar Facebook vanar. Tá ið eg havi fingið nokk av innihaldsleysum status'um, sletti eg mín profil í illsinni. Men nú havi eg verið á Facebook aftur í eina tíð. Sikkurt forvitni, sum sigrar.





**MÍTT MAGASIN**
Eg haldi eitt magasin. Tað eitur Ræson, sum er ein danskt tíðarrit um altjóða politikk. Innihaldið í magasininum er rættiliga breitt – og greinarnar eru skrivaðar journalistiskt. Tað dámar mær væl. Eg keypi av og á Euroman. Ofta eru feitar greinar í blaðnum.

**MÍN SJÓNVARPSRØÐ**
Dr. Gregory House er glimrandi. Deiliga speiskur og ónøgdur inn á tilveruna. The Daily Show plagi eg eisini at hyggja eftir, tá eg kann. Californiacation havi eg eisini fylgt við í. Serliga fyrstu sesongirnar. Eitt slag av »Sex in the City« fyri mannfólk.

**MÍN BÓK**
Eg lesi serliga politiskar bøkur. Millum seinastu bøkurnar, eg havi lisið, var tann hjá Einari Már Guðmundsson um kreppuna í Íslandi. Í løtuni eri eg í gongd við »Pol Pots Smil« eftir svian Peter Frøberg.

**MÍTT ÚTVARP**
Eg lurti serliga eftir Kringvarpinum. Rás 2 fangar meg sjáldan. Eg haldi, at Kringvarpið hevur betra seg munandi síðan farna summar, tá dygdin var so sum so. Sendingar sum Skannarin, Eygsjón, Vitan og Perspektiv flyta og eru veruliga til tað betra. Meira av hasum!

**MÍN TELEFON**
Eg havi eina kekkaða Sony XPERIA, sum eg havi fingið frá arbeiðsplássinum. Hon er nógv for kekkað og innviklað til mín.

**HVAT VIL TÚ IKKI BRÚKA MIÐLATÍÐ UPPÁ?**
Paradise Hotel og aðrar innantómar reality sendingar, har semikend fólk eta døgurða hjá hvørjum øðrum ella har Caroline Fleming vaskar húsini hjá fólki.

**HVAT IRRITERAR TEG Í MIÐLUNUM?**
Raðfestingina. Eg veit fullvæl, at føroysku bløðini hava tað torført figgjarliga, men tað ger tað ikki rætt hjá Sosialinum og Dimmalætting at raðfesta søgur sum »Hundurin Marta mundi endað sum grýturættur« ella »Føroyingar eta fleiri tons av skipskeks« á forsíðuna. Tað er ein fúl undirmetan av lesaranum, um redaktiónirnar halda, at hesar forsíður selja bløð. Tað er eisini ótolandi at hoyra seinnapartsendingar, har vertirnir halda, at tað er áhugavert hjá okkum lurtarum at fáa at vita, hvat júst TEY halda um ymisk viðurskifti. Tað haldi eg sum lurtari ikki. Tað er eisini ein misskilt sjálvpromovering, at ávísir vertir ikki kunnu fara út um útvarpsstovuna uttan at eitt myndatema verður sett upp á Portalinum, har 18 av 20 myndum eru profilmyndir av sjálvum vertunum. Kundi verið áhugavert at sæð fleiri myndir at staðnum ella persónunum, sum varpað verður út um.

**HVAT VIL TÚ HAVA MEIRI AV Í MIÐLUNUM?**
Dýpd, bakgrund og undirhald. Kundi hugsað mær at vit fingu eina satirusending antin í útvarpi ella sjónvarpi. Eg kundi eisini hugsað mær, at vit hyggja meira úteftir – kundi verið áhugavert at havt føroyskar sendingar, sum tóku pulsin á útlendskum streymum innan eitt nú politik, vinnu, tónleik, og bókmentum. Vit hava stórliga brúk fyri, at politisk viðurskifti verða sett í ein samanhang. Eg kundi hugsað eitt longri politisk magasin við íblástri frá Deadline, Mogensen/Kristiansen ella Jersild og Spin. Eygsjón er avgjørt eitt fet rættan vegin, men tann sendingin fevnir breiðari og ofta eru tað ikki meira enn 10 minuttir til hvørt evni. Hóast batar eru at hóma, so kundi eg hugsað mær meira mentanartilfar.